Lesið sosialin

HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

| Verksmiðjumerki | km. | mán. | árg. | søluprísur |
|---|---|---|---|---|
| BMW 316 (1.6) EILER | 30.000 | Juli | 1997 | 129.000,- |
| Suzuki Baleno Van | 35.000 | Aug. | 1997 | 75.000,- Við MVG |
| Ford Escort Diesel | 86.000 | Aug. | 1996 | 103.500,- |
| Citroën BX 1.9 Diesel St. | 185.000 | Aug. | 1991 | 49.000,- |
| Opel Astra 1.6 GLS | 66.000 | Sept. | 1995 | 92.500,- |
| Citroën Xantia 3.0 V6 | 34.500 | Juni | 1998 | 180.000,- |
| Mitsubishi Lancer Diesel | 189.500 | Juli | 1990 | 23.000,- |
| GALLOPER 2.5 TDi - 7 pers. | 37.400 | Apríl | 1999 | 215.000,- |
| Fiat Scudo 1,9 TD vørub. | 130.000 | Mars | 1997 | 130.000,- |
| Citroën ZX 1.9 D Stw. | | Feb. | 1995 | 89.000,- |
| Opel Astra 1.7 TD | 81.000 | Des. | 1996 | 115.000,- |
| Mitsubishi L300 vørub. | 90.500 | Aug. | 1998 | 115.000,- Við MVG |
| Opel Astra 1.6 4H | 60.000 | Mars | 1996 | 95.000,- |
| Citroën Xantia 1.9 TD St. | | Mars | 1998 | 151.000,- |
| Isuzu Pick-Up 4x4 | 226.500 | Okt. | 1989 | 15.000,- |
| Citroën Xara 1.9 TD St. | 29.000 | Apríl | 1999 | 142.000,- Við MVG |
| Opel Corsa | | | | 15.000,- |

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ!

AVHEINTINGAR-TILBOÐ
Daihatsu Charade Árg. des. 1991 • koyrt 170.000 km. • Einans kr. 19.000,-

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Hoyvíksvegur 63 - FO-100 Tórshavn - Tel. 313666 - Fax 310866

Sosialurin - 311820

*Tilbúgving í verki:*

# Sjúkraliðið í Vágum stóð sína roynd til reint ug

*Stórt arbeiði verður gjørt í Vágunum fyri at fáa okkum eina vælvirkandi og nútíðarhóskandi tilbúgvingarskipan. Seinasta vikuskiftið, tá ein franskur trolari var í havsneyð við Føroyar, slapp „Sjúkraliðið" í Vágum at standa sína roynd*

JAN MÜLLER

Í sambandi við arbeiðið við Tilbúgvingararætlan fyri Føroyar varð avgjørt at byrja við Vágunum: at gera eitt "pilotprojekt", sum síðani kundi brúkast og lagast til restina av landinum. Hetta projektið, sum vanliga verður kallað "Vágamodellið" er komið væl áleiðis, men er tó ikki heilt liðugt enn. Sosialurin hevur tosað við Regin Jespersen hjá løgregluni í Vágum, sum er ein av lyklapersónunum í tilbúgvararbeiðinum.

Arbeiðið við tilbúgvingarætlanum er annars sett í gongd kring landið, har løgreglan, brunaumsjónin, bjargingarfeløg og kommunur í tøttum samstarvi eru í gongd við at virka eina tilbúgvingarætlan fyri teirra øki, og er ætlanin, tá ið hesar ætlanir eru lidnar, at samskipa allar hesar í eina størri ætlan, sum væntandi fær heitið „Tilbúgvingarverkætlan fyri Føroyar".

Regin Jespersen sigur, at ætlanin er at koyra eftir sama leisti kring alt landið, soleiðis at skilja, at verður assistanca veitt millum økini, so skulu øll vita, at tað er sami leistur, sum er galdandi allastaðni.

### Halda skeið

Taka vit Vágoynna so eru ætlanir hjá teim ymisku bólkunum samskipaðar. Tað hava verið hildin ymisk felags skeið og felags venjingar, sum hava givið eitt sera gott úrslit. Ætlanir eru eisini frammi um at gera smærri viðkomandi skeið fyri teir ymisku bólkarnar og at "læra" hesar at samstarva.

Ein sera stóran leiklut í tilbúgvingini fyri Vágar – og fyri so vítt um alt landið – koma bjargingarfeløguni at hava. Í Vágum er tað Vága Bjargingarfelag, (VBF).

VBF var áður skipað sum ein stórur bólkur, men síðani gongd kom á tilbúgvingararbeiðið í Vágum er VBF skipað í fleiri smærri og størri eindir, við "serkønum" fólkum í hvørjari eind.

VBF telur nakað yvir 400 limir og kann roknast við, at eini 120 – 150 kunnu tilkallast í eini vandastøðu. Hesi umboða ambulansatænastu, sjúkralið, bjargamenn, leitingarlið, bátalið, psykisk l. hjálparlið, rossalið, froskmenn, hjálparfólk og stuðlar.

Regin Jespersen sigur, at tað í sambandi við tilbúgvingararbeiðið varð mett, at hjálpiarbeiðið á og við eitt skaðastað átti at verða betur skipað. Tað hava ymiskar venjingar víst er neyðugt.

Tí bleiv eitt skeið gjørt, ið skeiðtænastan hjá Landssjúkrahúsinum samskipar og sum m.a. fevnir um: l. hjálp, víðkað 1. hjálp, kort- og kumpasslæru, børuteknik, samstarv við tyrlur, samstarv við læknar, samstarv við ambulansur, samstarv við løgreglu, samskifti o.s.f.

Tilsamans 39 fólk í Vágum og Mykinesi hava lokið hetta skeið, og eru hesi fólk úr heilsutænastuni í Vágum og úr VBF.

Eftir ráðføring við teir serkønu á Fróðskaparsetrinum, fekk hetta skeið/lið heiti „Sjúkralið".

### Brúk fyri Sjúkraliðinum

Seinasta vikuskiftið var so fyrstu ferð av álvara brúk fyri hesum Sjúkraliði. Boð komu til Vága Floghavn um, at eitt franskt skip við 18 monnum var í havsneyð uttanvert Ytrabanka, og at ein bretsk tyrla helst vildi koma til Vága Floghavn við manningini. Eingin visti nakað um, hvussu manningin var fyri, men fyri at verða fyrireikað til møguligt átak, vórðu boð send til Vága Bjargingarfelag um at hjálpa, um so var, at manningin bleiv tikin av skipinum og flutt til Vágar.

Kalliskipanin eftir sjúkraliðnum virkar eftir eini "telefonketu", soleiðis at bert er neyðugt at ringja til ein persón, og vil hesin síðan ringja víðari soleiðis, at at enda hava øll fingið boð. Fjórðu ferð skal "kontrollringjast" til formannin hjá VBF ella alarmcentralin, so at ein altíð veit, hvussu nógv hava fingið boð og koma.

Í tøttum samstarvi við sløkki- og bjargingartænastuna hjá Vága Floghavn, vórðu teppi fingin til vega umframt at børur eisini vóru tøkar, um hetta bleiv neyðugt.

Tað gekk stutt tíð at fáa boðini gjøgnum "telefonketuna", og tá ið tíðin var komin til, at Sjúkraliðið skuldi møta á Vága Floghavn, vóru 33 av teim 39 fólkunum komin til staðar. Hini restandi høvdu umstøður, sum forðaði teimum at møta.

Kl. 2000 komu so boðini um, at tað var eyðnast at fáa pumpur umborð á trolaran og tiltakið bleiv síðan avlíst.

Eftir kaffimunn og evaluering (eftirmeting) fóru øll væl nøgd til hús, og tóku hetta sum eina sera realistiska venjing greiðir Regin Jespersen frá.

### Ber frukt

Hann sigur annars, at tey, sum arbeiða við Tilbútvingarætlanini fyri Føroyar, kundu tí við hesum staðfesta at ein partur av arbeiðinum, sum er farið fram, longu nú vísti seg at bera frukt .

– Tað vísir, at vit eru á røttu leið sigur Regin Jespersen, sum við hesum fegin vil eggja fólki til at taka tilbúgvingina í álvara. Hann vil við hesum eisini fegin sleppa at geva Sjúkraliðnum og VBF eitt herðaklapp.

Sosialurin skilur, at tað verður arbeitt rættiliga miðvíst við tilbúgvingarætlanunum í Vágum. Í desember mánað fara kommunulæknin og tannlæknin í oynni til Danmarkar at luttaka á einum skeiði, sum „Beredsskabsstyrelsen" skipar fyri. Hetta er eitt skeið, sum snýr seg um tað samskipandi læknafunktiónina í eini skaðastøðu, nakað, sum nettupp hevur víst seg ikki at virka nóg væl, tá skipað hevur verið fyri bjarging í sambandi við vanlukkur.

sosialurin sosialurin sosialurin -har tað hendir



# Tr‡ pør av tvíbur›um á sjúkrahúsinum

*Óvanliga nógvir tvíbur›ar eru føddir í ár, og herfyri lógu tr‡ pør á landssjúkrahúsinum í senn*

STEFAN Í SKORINI

Ta› er ikki hvønndagskostur á Fø›ideildini á Landssjúkrahúsinum í Havn, at tríggjar mammur allar eiga tvíbur›ar í senn. Í ár var› tó so væl lagt til rættis, at tr‡ pør lógu saman á Fø›ideildini.

Ta› kann vera sera ymiskt frá ári til ár, hvussu stórt tali› av tvíbur›um er, men hetta ári› hevur roynst sera væl, hvat talinum av tvíbur›un vi›víkur, ver›ur sagt av Fø›ideildini. Eisini er barnatali› sum heild økt í ár.

Ta› er tó hent fyrr, at tríggir hava ligi› í senn, men ta› eru nú nøkur ár sí›ani. Ta› merkisverda tá var, at allar mammurnar vóru úr Su›uroynni. Hesufer› er bara tann eina ha›ani, me›an hinar eru úr høvu›ssta›num.

Ein av ja›rarmø›runum á Fø›ideildini sigur, at tvíbur›ar ofta ganga aftur í ymsum familjum, og ta› kann tí ganga í arv, men ta› er tó ikki vísindaliga prógva›. Nógv bendir tó á hetta.



*Tríggjar fegnar mammur vi› sínum tvíbur›um í favninum. Frá vinstru er ta› Frida Mouritsen vi› tveimum gentum, Marjun Reinert Simonsen í mi›juni vi› eini gentu og einum drongi og høgrumegin er ta› Rannvá Skála vi› tveimum dreingjum*

Mynd: Álvur Haraldsen

Tær, sum hesufer› áttu tvíbur›ar, vóru Frida Mouritsen úr Vági, Marjun Reinert Simonsen úr Havn og Rannvá Skála eisini úr Havn.

Genturnar hjá Fridu viga›u 1890 og 1925 gram og bá›ar vóru 43 cm til longdar. Frida átti 18. august.

Tvíbur›arnir hjá Marjun vór›u føddir 8. september. Teir viga›u 2700 og 3000 gram og vóru 47 og 50 cm.

Dreingirnir hjá Rannvu Skála komu til ver›ina 5. september. Tann eini viga›i 2900 gram og var 48 cm. Hin viga›i 2375 gram og 47 cm. til longdar.

# J & K Petersen 25 ár

*Byggifelagi› J & K Petersen hevur nú havt 25 ár á baki í føroysku byggivinnuni, og hátí›arhald hevur veri› í n‡ggju hølunum*





*Stjórin í J & K Petersen, Ragnhild Petersen (Guggan) frammanfyri n‡ggja bygninginum hjá byggifelagnum á Hjalla*
Mynd: Jens Kr. Vang

STEFAN Í SKORINI

30. apríl í 1975 var› fyrsti ma›urin settur í starv í byggifelagnum J & K Petersen. Felagi› var› stovna› á vári hetta ári›.

Ta› vóru brø›urnir John og Kristian Arnfinn Petersen, sum tóku seg saman um at seta felagi› á stovn í Skopun.

Felagi› er í ár flutt í n‡ggj høli á Sandvíkahjalla, og dagurin var› hátí›arhildin, samstundis sum tey n‡ggju hølini vór›u tikin í n‡tslu.

Móttøka var 25. august, og eini 200 fólk løgdu lei›ina framvi› n‡ggju hølunum. Dagin eftir var veitsla fyri starvsfólkunum vi› maka.

Í n‡ggja bygninginum er skrivstova, verksta›ur og betongsøla. Í fyritøkuni arbei›a í løtuni eini 40 fólk, men a›rar tí›ir hava veri› eini 50 fólk til arbei›is. Ta› veldst alt um, hvussu nógv fólk tey ymisku arbei›ini krevja, ella hvat slag av arbei›i talan er um. Í løtuni er einki byggiarbei›i, sum vanliga krevja flest fólk. Flest fólk eru um summari›.

J & K Petersen hevur arbei›i tr‡ ár fram í tí›ina beint nú. Eisini hevur felagi› keypt helmingin í einum felagi í Grønlandi og hevur eitt sjálvstø›ugt felag í Íslandi. Solei›is kann felagi› ver›a virki›, tá virksemi› er líti› í Føroyum.

Ragnhild Petersen, vanliga nevnd Guggan, er stjóri í fyritøkuni og hevur veri› ta› sí›an 1991.

## Rætting

Av misgávum var› eitt av eftirnøvnunum hjá einum av valevnunum á javna›arlistanum skeivt stava› í bla›num í gjár.

Ta› skal av røttum vera Ingrid Jacobsen vi› c og ikki vi› k, sum annars var› skriva› í bla›num í gjár.

MILLENNIUM
VÁGSBOTNUR • TEL 31 80 80
HVAT SKAL EG Í ?
Handilin er á tremur við nýggjum klæðum.



MILLENNIUM
petur & petur • 320870
VÁGSBOTN